# Hjarta og skomm

*Jóhann*

Úr einum gomlum ómodernaðum húsum, hyggi eg oman í fjøruna. Eg eygleiði, hvussu aldurnar koma inn móti landi. Eg føli, at ein køld hvirla, fær norðastu síðuna á húsinum at rista. Tað er sunnudagur, og nátturin stendur enn á borðinum. Pápi liggur á sofuni við eini øl í hondini, sum er um at detta á gólv. “Kundi hann ikki komið og tikið nátturan av borðinum,” hugsi eg, men byrji kortini sjálvur at rudda av. Tá ið eg eri liðugur fari eg inn á kamarið og seti meg á songina takik ensktbókina fram og byrji at lesa.

Tá ið eg vaknaði morgunin eftir fór eg inn í køkin, fekk mær eitt glas av mjólk og skuldi fáa mær eina breyðflís, men sjálvandi hevði pápi ikki keypt breyð. Hann mintist bara til ølirnar. Pápi lá í sofuni og snorksvav. Eg tók ein plastposa og fór inn í stovuna og fylti tær tómu dósirnar av øli upp í. Nú var klokkan farin av hálvgun sjey. Eg mátti skunda mær, fyri ikki at verða ov seinur til bussin. Tá ið eg kom inn í skúlastovuna, sótu bestu vinmenninir altíð aftast og goymdu mær pláss. Vit tríggir hava verið vinmenn, síðani eg flutti til Havnar. Bergur er hægstur í flokkinum, er ljóshærdur og hevur blá eygu. Andras harafturímóti er av tí minna slagnum og hevur brúnt hár og brún eygu. Vit tríggir hava tað altíð gott, tá ið vit eru saman. Framman fyri mær situr vakrasta gentan í skúlanum, Marjun. Eg hevði hoyrt frá Dánjali úr tíggjunda, at hon hevði eyga á mær, men eg var ivasamur, um tað mundi vera satt. Eg spurdi vinmenninar um teir høvdu hoyrt nakað, men tað høvdu teir ikki. Tá ið fríkorterið var komið, sá eg Marjuna fara út í gongina. Eg fylgdi aftaná henni og steðgaði henni. Hon vendi sær á og smíltist. “Hey Jóhann,” segði hon og spurdi, hvat eg vildi. Eg spurdi hana, um hon hevði hug at fara í biograf fríggjakvøldið. Tað kom ein mjúkur látur úr henni, men hon svaraði kortini ja.

Tá ið eg var komin heim úr skúla, sat pápi við køksborðið og las úr vikublaðnum. ”Hey góði,” segði hann og bað meg koma inn í køkin. Hann spurdi, um eg kundi gera honum ein kaffimunn. Eg suffaði og spurdi, hví hann ikki kundi gera tað sjálvur. Hann suffaði aftur, og hugdi at mær. “Er alt í lagi,” spurdi hann. Eg setti meg við køksborðið yvir av pápa og fortaldi honum, at eg og Marjun fóru út fríggjakvøldið í biograf. Hann flenti blídliga og spurdi, hví eg ikki var glaður um tað. ”Tað er ikki tað,” segði eg. Eg fekk ikki meg sjálvan til at siga nakað. Hvørja ávirkan fór tað at hava á pápa, um eg fortaldi honum, hvussu eg hevði tað. Hann bleiv ikki blíður, um eg fortaldi honum, hvussu flovisligt tað var at hava ein pápa, sum ikki kundi sleppa ølunum, hugsaði eg. Eg svølgdi ein stóran klump og reisti meg upp frá borðinum. Pápi hugdi ørkymlaður, men eg fór beint inn á kamarið. Marjun skal ongantíð fáa at vita, hvussu pápi er. Hon skal ikki koma nær húsunum. Nei, pápa skal hon als ikki hitta. Um hon hevði funnið út av, hvussu viðurskiftini vóru heima, var eingin ivi í, at mín møguleiki er farin.

*Marjun*

Tað er sunnukvøld. Myrkrið liggur sum eitt teppi yvir havnina. Tað er stilli, og ikki hómast eitt orð. Endiliga er tað friður. Friður er ikki nakað, sum er at finna heima. Soleiðis er at hava systkin. Altíð hoyrist róp og skrál. Sunnukvøld er tað besta, eg veit. Mamma og pápi eru heima. Tann einasti dagurin í vikuni, har eg ikki nýtist at vera barnagenta. Tann einasti dagurin, har eg havi tíð at vera eg. Nei, ikki er tað lætt at vera elsta barn. Mamma og pápi hava nóg nógv at hugsa um við øllum børnunum, so tey leggja ikki nakað serligt í meg. Um eg eri heima ella úti sunnukvøld, leggja tey ikki í. Tað er sum um, at eg ikki hoyrist í oyrum

teirra. Men er tað nakar, sum hoyrir meg og leggur í meg, so er tað besta vinkonan, Sandra.

Morgunin eftir kom mamma inn á kamarið hjá mær fyri triðju ferð. “Kom nú, tú verður ov sein í skúla.” Eg kundi ligið restina av vikuni, hugsaði eg, men fór kortini upp úr songini. Eg gekk oman eftir gongini. Eg fekk næstan ikki gingið fyri øllum leikunum. Beint tá ið eg skuldi fara inn á vesið, kemur lítli beiggin, Símun Pauli, og skumpar meg til viks og læsir hurðina. Altíð skuldi hann øsa meg upp. Eg fór aftur inn á kamari, tók bustina og greiddi hárið. Eg setti meg frammanfyri sminkuborðinum, ið abbi hevði bygt síðsta summar. Eg hugdi í speglið og smurdi mascaru á eygnavippurnar. Í dag verður tað. Í dag fer hann at varnast meg, hugsaði eg, og lat meg í frakkan og fór avstað.

Tá ið eg nærkaðist skúlastovuni, fór hjartað at banka. Eg bleiv eitt sindur nervøs. Eg tók kortini í hondtakið á hurðini og fór inn í stovuna. Øll vóru longu komin. Var eg so sein, hugsaði eg og hugdi at klokkuni. Lærarin hugdi eitt sindur dømandi at mær, sum um hann altíð var til tíðina, tá hann var ungur, hugsaði eg og gekk spakuliga aftur í stovuna. Áðrenn eg seti meg niður, hugdi eg upp á Jóhann. Hann smíltist og heilsaði við høvdinum. Eg bleiv eitt sindur reyð í høvdinum. Sandra fór at flenna, tí hon sá, hvussu forlipt eg var. Í fríkorterinummátti eg reisa meg, og for út í gongina. Tá føldi eg at onkur prikaði meg á øksluna. Eg snaraði høvdinum. Tað var Jóhann. Eg visti ikki, hvat eg skuldi siga, tí hvat um eg segði okkurt býtt. Hvat mundi hann fara at halda, hugsaði eg, men svaraði kortini “hey.” Hann spurdi meg eitt sindur ivasamur, um eg hevði tímað í biograf fríggjakvøldið. Eg smíltist og svaraði, “at tað vildi eg fegin.” Aldrin havi eg verið so glað. Eg rann inn aftur í stovuna fyri at fortelja Sandru. Sandra fór at flenna blídliga, men áðrenn vit vistu av tí, var tímin byrjaður aftur.

Tá ið eg nú var komin komin heim úr skúla, fór eg beint inn á kamarið. Tað er friður. Eg seti meg við skrivaraborði og byrji at gera heimaarbeiði. Eg fái

barasta ikki hugsavnað meg. Jóhann er allastaðni í høvdinum. Eg fór so inn í køkin, men so komu tey brádliga. Larmurin var komin, og nú vóru øll heima. Hvørki mamma ella pápi spurdu meg, hvussu mín dagur hevði verið, ella hvat eg hevði lært í skúlanum í dag. Hendan familjan er ræðandi. Høvdið er um at bresta. Hvat fer Jóhann at hugsa, tá hann sær familju mína?" Eg vil ikki vita tað.